## Frem leingir við ungar spælarar

Danska felagið Frem, sum hevur tríggjar føroyskar spælarar í hópinum, hevur longt sáttmálarnar við tvey av talentunum í felagnum. 17 ára gomlu Frank Palka Jensen og Adda Djeziri hava lont sáttmálarnar í ávíkavist trý og hálvtannað ár.

– Vit hava stóran talentmassa í Fram, og tað er hesar spælarar, sum vit skulu byggja eitt nýtt stórlið á, sigur Hans Hermansen, stjóri í felagnum.



## Todi legðist sjúkur

Ætlanin var, at Todi Jónsson skuldi verða við í dystinum hjá Start ímóti Brann í gjárkvøldið, men soleiðis skuldi ikki vera. Enn einaferð var Todi óheppin, og beint undan dystinum legðist hann sjúkur. Tað gekk illa hjá Start, tí Brann vann dystin 1-0, og tí hevur Start fingið eina sera vánaliga byrjan upp á nýggja kappingarárið. Liðið hevur fingið eitt stig í trimum dystum, og tað er ikki nøktandi fyri felagið, sum var við í toppinum í fjør.

# Belgiumaður fylgir føroysku kvinnunum

**Heimasíðan Soccerway fylgir væl við í kvinnufótbóltinum í Føroyum. Á heimasíðuni eru dagførd úrslit og upplýsingar um føroyskan kvinnufótbólt**

FÓTBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Heimasíðan Women Soccerway fylgir væl við í føroyskum kvinnufótbólti. Heimasíðan hevur øll dagførd úrslit, støðu og aðrar upplýsingar um føroyskan kvinnufótbólt.

Tað er belgiumaðurin Hans Ijsbrandy, sum skrivar um føroyskan kvinnufótbólt fyri Soccerway. Hann er fótbóltsdómari og er sera áhugaður í kvinnufótbólti.

– Soccerway hevur 10 milliónir síðuvísingar um mánaðin, og heimsíðan telist millum 20 tær mest brúktu fótbóltssíðurnar á netinum, sigur Hans Ijsbrandy.

Soccerway skrivar um allar fótbóltskappingar í Europa, og á síðuni um føroyskan kvinnufótbólt eru leikarahópar frá fleiri feløgum, hagtøl um feløgini. Og eftir hvørt umfar í landskappingini er frásøgn við myndum frá einum dysti og hagtøl frá øllum hinum dystunum.

### Største úrslitatænasta í heiminum

Tað, sum Soccerway skrivar um kvinnufótbólt kring allan heimin, er mest umfatandi dekningurin av kvinnufótbólti, sum finnist á internetinum.

Dentur verður serliga lagdur á norðurlendsku kappingina, men Soccerway fer eisini víða til nógv onnur lond.

Samanlagt verður fylgt við í 380 ymiskum kappingum í meira enn 100 londum. Dagføringar verða gjørdar allatíðina, og úrslitatænastan er tann støra í heiminum.

Tey, sum hava hug at leggja leiðina fram við síðuni, kunnu klikkja seg inn á www.women.soccerway.com

# VÍF vann FM



*Gentur 14 ár hjá VÍF hava vunnið bæði landskappingina og steypakappingina í vetur. Tær eru aftast frá vinstru: Erla Olsen hjálparvenjari, Brynhild Seloy hjálparvenjari, Linda Davidsen,Ingilín Strøm, Liljan Djurhus, Sólgerð Joensen , Ingi Olsen venjari. Í miðuni frá vinstru Agnas Olsen, Jona Zachariasen, Oddvør Vang, Asta Múller, Sólja Thorleifsson, Tóra Seloy. Fremst frá vinstru: Liljan Petersen og Ragnhild á Heygum. Á myndini vantar Halla Durhuus*



## Stuðulsavtalan endurnýggjað

Herfyri undirskrivaðu ÍSB og Skemman eina endurnýggjan av sínamillum avtaluni. Skemman er annar høvuðsstuðulin hjá ÍSB, og henda avtalan verður galdandi í 3 ár. Báðir partar eru væl nøgdir við samstarvið hesi undarfarnu árini og síggja fram til framhaldandi gott stamstarv.



GITIÐ LEIKARAN

**Kappingarreglur**

Frá mánadegnum 3. apríl og í 15 fylgjandi Sosialum verður andliti á einum kendum føroyskum fótbóltsspælara at síggja. Myndin er tó viðgjørd nakað, soleiðis at tað verður truplari at vita, hvør spælarin er.

Á síðu 31 í fótbóltsblaðnum, sum var partur av VikuskiftisSosialinum, eru 15 tómar reglur. Á hesar skulu nøvnini á teimum 15 spælarunum setast.

Tá hetta er gjørt, skal blaðsíðan við nøvnunum sendast okkum. Seinasta freist fyri innlatan er mánadagin 1. mai. Navnið á vinnaranum verður kunngjørt í Sosialinum tann 4. mai.

Minnist til at skriva navn, bústað og telefonnummar á seðilin, sum verður sendir okkum.

Verður avrit av síðuni sent okkum, verður hetta ikki roknað sum gyldugt luttøkuprógv.



Vinnið fótbóltsupplivingina Skotland - Føroyar

ATLANTIC AIRWAYS